Og vit standa púra býtt...

— Góður útvarpsleikur

Leygarkvøldið 18. februar høvdu vit høvi til at hoyra ein frálíkan útvarpsleik, sum hin ungi Sigmund Poulsen hevur skrivað.

Leikurin viðger dálkingina við kemiskum evnum, og hetta ger Sigmund sera heppisliga við at leggja handlingina í Føroyum, so vit reiðiliga fingu varhugan av, hvussu álvarslig dálking kann vera. Og at hon eisini viðkemur føroyingum og ikki bert í-búgvum í t.d. Seveso í Italiu og Teckomatorp í Svøriki.

Og heppisliga vísti hann okkum á, hvussu lítið starvsfólk og íbúgvar vistu um tað, sum fyrifórst á virkinum. Einans sonevndir serfrøðingar vistu um henda stóra vanda. Men sjálvsagt, tá skaðin var hendur, vóru teir boðsendir. — Sum tá oljan rann úr tanganum í Søldarfirði fyri fýra árum síðani. Um fólk vilja síggja hvørja loysn, hesir sonevndu serfrøðingar í hesum føri komu til, so farið oman á oyruna á Skálafirði og hyggið.

Ein óhugnalig sjón. Um enn bert ein lítil vágpirra samanborið við tann svullin, ið var viðgjørdur í útvarpsleikinum.

Og altíð verða hesir sonevndu serfrøðingar ráðspurdir — teir tala, og vit standa býtt av berari virðing fyri hesar ekspertvitan.

Hetta er tað, Sigmund nemur við og ávarar móti í hesum útvarpsleikinum. Haldið eygu og oyru opin — verið á varðhaldi, tá talan er um serfrøðingar innan íðnað.

Nú er at spyrja, hvørjar upplýsingar politikarar fáa, áðrenn teir geva loyvi til íðnað av ymsum slag. Frá serfrøðingum sjálvandi, teir hava ongan betri at ráðføra seg við.

Í USA er gjørd ein nágreinilig kanning av, hvat virði er í teimum upplýsingum politikarar fáa frá serfrøðingum innan íðnað. Tað er syndarligur lesnaður. Syndarligur. Tað er ikki lætt at vera politikari við ábyrgd.

Í Danmark er fyri fleiri árum síðani stovnaður felagsskapur móti dálking. Er tíðin við at vera búgvin til tað í Føroyum eisini?

Aftur til útvarpsleikin. Hann var stuttur, sum slíkir leikir eiga at vera. Hann viðger eitt evni, sum kemur okkum øllum við, samstundis sum hann var spennandi, sum besta kriminalsøga.

Og ikki at gloyma tey, ið leikaðu og løgdu til rættis. Ikki haldi eg meg hava hoyrt nakað so nátúrligt framborið í Útvarpi Føroya.

Her var Útvarpið heppið.

Góði Sigmund. Her hevur tú fingið fatur í rætta endanum. Dálkingin í einum samfelag kann vera so mangahandað. Eisini sálarlig. Siðspillandi.

Ta seinastu tíðina hava vit upplivað fanatiska dálking við lít. Og eisini her eru sonevndir serfrøðingar uppá spæl og siga okkum, hvat er rangt og hvat er rætt.

Og vit standa púra býtt.

Jónas

Seymistovan í Klaksvík

Í dag kl. 16 og 19.30 og sunnudagin kl. 19 framførir Havnar Sjónleikarfelag sang- og skemtileikin Seymistovan eftir íslendingin Kjartan Ragnarsson í KÍ-høllini.

Seymistovan varð vist 30 ferðir í Havn og vóru sýningarnar væl vitjaðar. Ætlanin er at ferðast til fleiri oyggjar við leikinum nú í vár, sigur formaðurin í Havnar Sjónleikarfelag, Oskar Hermannsson.

dag frá degi



filmir



Haldið krútið turt

Heimssøgan hevur síni kelduskriv og frágreiðingar frá fólki, sum hava sæð hendingar fara fram og hertil hoyra nógvar bøkur. Ein áhugaverd frágreiðing, sum hoyrir til søguna hjá Ameriku, er um sjórænarar í Karibiska Havinum, sum er skrivað av einum manni, sum sjálvur í fleiri ár var í valdi sjórænaranna — italiumaðurin Emilio Salgaris.

Filmurin greiðir frá um tann unga greivan Emilio Ventimiglia, sum hevur sæð egnu foreldur síni verða dripin av beistakenda flamska aðalsmanninum Van Guld. Tá hesin verður útnevndur til guvernør fyri spanska kongin í Venezuela, avger Emilio at taka hevnd, og hann loypir á figginda sín í einum væl vardum býi, og tað kemur til drápuligar dystir. Við sær hevur Emilio sínar dystglaðu sjórænarar. Afturat hesum álvarsligu hendingunum er hann (filmurin) eisini skemtiligur.

Filmurin verður sýndur í Leikhús Bio.

Milano kaliber 9

Á loyndarfullan hátt verður ein pakki umbýttur á høvuðsjarnbreytini í Milano. Tá tann síðsti móttakarin opnar pakkan, finnur hann ikki sum væntað 300.000 dollarar, men bert blankt pappír. Pengarnir skuldu verið smuglaðir út úr Italia og til Sveis av tí kenda Mikado-harkaliðnum. Mikadoin hevur eina organisasión, sum fæst við at smugla pengar hjá stórum idnaðar- og handilsfólki út av landinum.

Eftir hesa hending fara vit 3 ár fram í tíðina, tá Ugo verður leyslatin, úr San Vittore fongslinum. Hann er ein maður, sum hevur arbeitt fyri Mikadoina, og verður eftir leyslatingina tikin upp í ein bil, har ráasti maðurin hjá Mikadoini, Rocco, sigur honum, at hann er vísur í, at tað var hann, sum stjól pengarnar — og at hann, hvar hann enn er, verður fylgdur. Hann skal at enda vísa teimum, hvar hann hevur fjalt pengarnar, um tað so verður av egnum vilja ella ikki. Ugo noktar hesum, men harkaliðið heldur, at hann eftir kvettið hevur latið seg handtaka av politinum fyri at vera í tryggleika og síðan flýggja av landinum og njóta pengarnar.

Ugo finnur fyrrverandi vinkonu sína, Nelly, sum er strip-tease genta, og hon heldur eisini, at tað er hann, sum hevur tikið pengarnar. Ugo heldur sjálvur, at tað er ein av teimum stóru innan Mikadoina, sum hevur tikið teir, og hann vil gera alt fyri at finna tann seka. Hann tekur tí og limar seg inn aftur í harkaliðið — hetta letur seg gera, tí leiðslan heldur, at nú verður tað lættari at finna út av, hvar hann ferðast.

Nú verða fleiri minni týðandi limir í harkaliðnum myrdir. Fleiri av teimum verða funnir í bumbusprongdum telefonrúmum ella wcum. Soleiðis sleppur Mikadoin sær av við fólk, sum hildið verður, at politiið hevur illgruna til.


Men spurningurin er enn — hvør stjól pengarnar?

Svarið finst í Leikhús Bio, har filmurin verður sýndur.

Automatsvararin í Leikhús Bio hevur tlf. 11131.

bøkur og bløð

Snotulig ævintýrabók



byrðaður og bíður hin kryvja seg við. Hann so gat, sum kolvin á risans bók og krývur hann. Risin doyði, og drongurin tók so alt gullið, í hellirnum var, heim aftur við sær.

RISIN OG BÓNDIN

Tíðindaferð var tað eio bóndi, sum bevðí fingið sín riva til at hjálpa sær við allum arbeiðinum. Bóndin segði við hann, at tað skuldi vera leo hansara, at hann skuldi hava lov at velja av øllum tí, sum tær vaksa, annaðhvørt sum partin, ið var niðri í jørðini, ella tann, ið ovanpá stóð.

Fyrsta ferð valdi bóndin tætur. Tá ið heystið kom, bað bóndin risan velja. Risin hevði kálblaðkarnar vera so ógvuliga vaksnar at sjggja og valdi tí sum sín part tað, sum ovanpá vaks. Soleiðis fekk hann alt kálið; men bóndin fekk allar rotarnar.

Tað var skjótt, at risin merkti, at hann hevði tikið lítið, tá ið hann valdi blaðkarnar, og bugnaði hann tí við sær sjálvum, at næstu ferð skuldi hann velja betur: tá skuldi hann taka tað, sum niðri í jørðini vaks.

Árið eftir valdi bóndin korn. Tá ið heystið kom, bað bóndin risan velja, og nú segði risin, at hann vildi eiga partin í niðru. Soleiðis fekk risin hálmin; men bóndin fekk alt kornið.

Nú var risin ramdiliga illur; og tók at hjálpa bóndanum treyt. Hann legði til og bað bóndan koma og kíkrast um kapp við seg; tær skuldu tá hava tað til ovrumis, segði hann at vita, hvør ið betur dugdi at kíkra — hann bugnaði um at fáa dripið bóndan.

Bóndanum er illa við, neyðandirvið, hann veit ikki, hvat hann skal gera fyri at sleppa undan hesum og fer til koms sína at kæra sína neyð fyri honni. Hon leggur honum tey ráð,

39

Umframt tær nógvu tekningarnar eru heitini á hvørjum ævintýri teknað

Føroya Lærarafelag hevur givið út bókina FØROYSK ÆVINTÝR I eftir Jákup Jacobsen. Jóhannes Enni og Jákup Olsen hava greitt tey 33 ævintýrini til prentingar.

Nógvar tekningar eru í bókini og tær eru av tí betra slagnum, gjørdar av Bárða Jákupssoni og feðgunum Williami og Zakariasi Heinesen.

FØROYSK ÆVINTÝR I er 140 blaðsíður og kostar 70 kr. innbundin. Hon er prentað hjá H. N. Jacobsens Bókahandli.